

Kirsten Klein: Summardagur við Svaneke. Fotomynd

# Av vatni er tú komin – ella?

**H2o er eitt væl umtókt nútímans klædnamerki, men eisini so nógv annað. Sum hvørt mannsbarn veit, er tað fyrst og fremst formulin fyri vatn. Sama vatnið er evnið fyri eina framúrskarandi listaframsýning í Kunstcentret Silkeborg Søbad, ið er opin til 22. sept. Eitt tvørfakligt framsýningartiltak, sum sjáldan sæst so stórt og stórfingið uttanfyri høvusstaðarøkið - og sum í sjálvum sær er vert at legga til merkis, tí tað boðar frá nýggjum leiðum innan list og mentanararbeiði sum heild, skrivar Jens Frederikssen í ummæli av framsýningini**

UMMÆLI
*Jens Frederikssen*



Heitið á projektinum og evnisframsýningini er Vatnmark (:"Vandskel og Vatershed" eru tey donsku og ensku heitini). Eitt sindur løgið heiti kanska, tí vatn eisini sameinir, men sum tað nevnist í innganginum í kataloginum, so hevur *"Vandene altid skilt sig, lige fra Moses og israelitterne vandrede tørskoede over det Røde Hav"* og tosað verður um at vit liva í *"vandskels-tider"* - bæði so og so - men mest verður hugsað um umfatandi mangulin uppá reint drekkivatn í heiminum.

## Vatn uttan mark

Vatnmark snýr seg tó primært um listarlig avrik, hvørt evni er onkusvegna bundið at vatni. Frá tí heilt vanliga: málningar og fotos við havinum sum høvuðsmotiv (tey sonevndu "marinemyndir" av orðinum *marin*:: hav) til installatiónir við sera ymiskari framsøgn og brúki av tilfari. Luttakarafjøldin streymar sum vatn í ánna: yvir 40 taka lut, og eg fáa tískil ikki nevnt øll.

Ikki bara myndir eru við. Tónleikur hevur fingið innivist í stóran mun. Eg fari seinni at greiða eitt sindur nærri frá um Palle Mikkelborg, men her kann stutt sigast, at so ymiskar profilar sum Hans Holm, sum stjórnar Silkeborg Kamarorkestur í G.F. Handells "Wassermusik" (20. august) og Petur Bruun sum hevur komponerað eina opera nevnt "Miki Alone", luttekur. Nevnda opera gevur m.a dømi um song, sum byggir á vatnmyndir! og hon kann hoyrast 12. og 15. september.

Tað meira tvørfakliga og beinleiðis nattúruvísindaliga í projektinum lati eg liggja, men viðmerkast skal, at framsýningin millum mong ymisk støð eisini fer fram á "Agua Ferskvands museum" í Silkeborg (og framsýningin er øll sum hon er framleidd í tøttum samstarvi við fleiri granskingardeplir). Er man harumleiðir og børn eru við skal man sjálvsagt gera sær tann beina eisini at fara




hartil tí nógvar ymiskar upplivingar fyri børn og vaksin er á skránni. Fyri tann meira tillkomna er her ígjøgnum framsýningartíðini nógv "hardcore" tilboð t.d. eitt internationalt symposium um globalar vatnumhvørvisspurningar (frá 6. september) og søguligt t.d. serframsýningar og nýggj vitan um, hvussu kleystruni í miðøldini bygdu kanalir, vatnbyrgingar og syrgdu fyri vatngoymsluni.





J. F. Willumsen: Baðandi børn á strondini í Skagen. 1909

## Ikki bara Berlin

Hyggja vit nærri at nøkrum pørtum av framsýningini, er tað ongin loyna, at nakað tað fyrsti man fær eyga á er okkara Tróndur Patursson. Verkið kenna nokk øll - tí fótbingjan "Kosmiskt rúm", 1999, sum vanligt stendur aftanfyri Listaskálan á tí bera asfalti, er fraktað til tað idylliska Silkeborg. Eitt satt danskt Schweiz í miniútgávu, og so ikki eitt orð um Himmelbjerget!

Framsýningarstaðið liggur beint við vakra vatnið Ørnsø og var, áðrenn tað fyri fimm árum síðani bleiv framsýningarhøli, "Sø og kurbad". Staðið sjálvt er í sjálvum sær eina søga um vatnið, sum eisini verður sýnt fram í framsýningini.

Bingjan stendur í parkini, sum er partur av framsýningarøkinum, beint yvirav høvuðsdyrnum.

Verkið er sum so ikki nýtt, men er sjálvandi tikið við, tí tað er eitt høvuðsverk í norðurlendskari list og á nógvar mátar ímyndar eina høvuðshugsan aftan fyri framsýningina sum heild: vatn sum íblástur fyri fagurfrøðilig verk, sum hava sett mørk.

Verkið er óivað so kent, at tað ikki krevur nærri frágreiðing, men stuttligt er tað at síggja, hvussu nógv samteksturin hevur at siga. Man sær bingjuna heilt øðrvísi - og tað í positivari merking - sum hon er plaserað í Silkeborg. Hon stendur beint undir einum stórum summargrønum eikitræi-á einum summargrønum grasvølli. At fara inn herífrá - inn í tað døkka svart-bláa -spegilsuniversið, er ein løgin og bergtakandi ævintýrkend uppliving. Tað er sum at festa í eina spreinging av dimensiónum millum vatnumhvørvi - og litverur: norður og suður í einum komprimeraðum ørkymlandi formi undirstrikað av einum góðum sólskinsdegi tann dagin eg vitjaði.

## Einasti úr Føroyum

Innandura er Tróndur eisini við - og sjálvt um tað er hongt fyrimyndarliga upp - øll framsyningin sum hon er - haldi eg ikki, at litografiserian um "Moby Dick", sum talan er um, hevur ta styrki, at hon gevur nakað stórt íkast til framsýningina. Verkið er óivað tikið við, tí man eisini hevur roynt at sýna spaðingina innanfyri ymisk motiv. Tróndur er í hesi sambandi "uppi ímóti" ongum øðrum enn Sven Havsteen Mikkelsen, sála - listamanninum við tí tætta tilknýtinum til føroyska list.

Ikki langt frá verkinum hjá Trónda hanga myndirnar til Melvilles bók um "Moby Dick" hjá Havsteen - og sum Wivel gera vart við í eini góðari grein í kataloginum um málningasøguna um shavid, so *"hører de træsnit han udførte til denne mageløse bog, om hvaler, hvalfangst og hvalfangeres vilkår mellem hans bedste. Ikke alene lever de kongenialt op til teksten, de lægger ovenikøbet noget til den, noget faktuelt og noget selvoplevet."* (fra "Vandskel" - greinin "Vandets Vælde" af Michael Wivel s. 162 ).

Tróndur Patursson er einasti luttakari úr Føroyum, og hann vitjaði eisini Silkeborg fyri 4 árum síðani, tá ein onnur stór framsýning (um evnið "Fuglar") var á skránni. Men Føroyar eru tó eisini á skránni á annan hátt - tí í einum pavillionbygningi í parkini, sum millum annað er valdur bara at vísa vatnlitsmyndir, er eisini eitt biografhøli, har ein hópur av longri og styttri filmum verða vístir - og áskoðararnir hava m.a høvi at síggja Ulla Boye Rasmussens "Tre blink mod vest".

Nú nomið er við pavilliongina har vatnlitsmyndirnar eru á skránni, haldi eg ikki, at tað gevur nakra stórvegis styrki til konseptið aftanfyri framsýningina sum heild. Sjálvandi er vatn - ein høvuðssubstansur í vatnlitum - men onkusvegna virkar sjónarmiðið eitt sindur uppgjørt. Kanska hómingin av "poppi" og óneyðugari ífyllu eisini stavar frá, at langt frá øll verkini her áttu at verið tikið við sambært dygdarsjónarmiðum. Anna Klint Sørensen, sála, og Aka Høeg undantikið í so máta. Báðar gera stóra og ørandi ávirkan, og teirra verk er einasta stóra undantak, hvat viðvíkur dygd og innihaldi. Ikki fyri tað. Tann greinin í høvuðskataloginum, sum snýr seg um vatnlitir sum teknikkur og sjálvstøðug framsøgn, er uppá sítt pláss. Tað er eitt essay av "Bodil Kaalund" við heitinum "Akvarel" - og er í høvuðsheitinum ein sera persónlig frágreiðing um, hvussu hon royndi akvaralmáling (sum barn), og hvat vatnlitir týddu fyri hana ígjøgnum eitt heilt lív, nevniliga "elementær fryd", sum hon rópar tað.

Og um ikki Føroyar verða tiknar á tunguna í tí sambandi (sjálvt um onki vatnlitsverk er við av føroyskum listafólkum). Loyvi eg mær at gera vart við hennara proportiónsfløkju! Í sama viðfangi sum hon nevnir listarlig verðinsnøvn sum Turner, Munch, Hill, Klee, Nolde og rósar teimum fyri tær upplivingar, tey hava givið henni, leggur hon í beinleiðis framhaldi aftrat - *"for ikke at tale om de færøske stærke malere, som alle mestrer akvarellen".* Ein generalisering, yvirmeting og samanbering, sum onki hald hevur í veruleikanum - og verður sostatt ein kliché til ampa fyri innlit í nakað sum helst.

## Ultima Thule

Komin inn í høvuðsbygningin - og í eina av høvuðsframsýningarhøllunum, verða sálin og eyguni drigin langt norðanfyri Silkeborg. Man fer at ferðast á mytiskari ferð við Aka Høegh, navnframu grønlendsku listarkvinnuni, sum sýnir

*Framhald á síðu 14*